## Full ferð á Amager

Tað gongur framvegis ógvuliga væl hjá FC Amager - í hvussu so er tá ið dystirnir verða avgjørdir á vøllinum. Í gjár vann FC Amager 4-0 í Roskilde. Støðan í hálvleikinum var 2-0. Tað vóru Roskilde og FC Amager, sum í fjør kappaðust um at vinna 2. deild eystur. Tá var Roskilde omaná, men bæði feløgini fluttu upp. Nú er FC Amager omaná. Tað vístu spælararnir hjá Toda Jónsson væl og virðiliga í gjár.

## 20 ár millum toppskjúttarnar

20 ár eru millum Trónd Sigurðsson og Jens Erik Rasmussen, sum kappast um at gerast tann besti málskjúttin í 1. deild hjá monnum. Tróndur Sigurðsson, sum spælir fyri AB, er føddur í 1988, og Jens Erik Rasmussen, ið spælir fyri 07 Vestur, er føddur í 1968. Tað man næstan verða eindømi, at tað er so stórur aldursmunur millum tveir fótbóltsspælarar, ið kappast um at gerast toppskjútti í einari vaksnamannadeild.

# Joan er heims-meistari

**Sum einstaklingur endaði Joan sum nummar sjey og saman við liðfeløgunum vann hon gull, tá HM-kappingin í triathlon á longum teini var í Hollandi í gjár**

TRIATHLON

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í triathlon á longum teini skulu íðkararnir svimja 4 kilometrar, súkkla 120 kilometrar og renna 30 kilometrar. So tað var ikki bara smávegis kapping, sum Joan og liðfelagarnir fóru undir í gjár.

Talan var um HM-kapping, og tí var talan sjálvandi um krútsterka mótstøðu, men hetta helt ikki Joan frá at gera seg galdandi. Sjálv gjørdist Joan nummar sjey í kappingini, og bara tað í sjálvum sær er eitt framúrskarandi avrik.

Og tað gjørdist ikki verri av úrslitunum hjá liðfeløgunum. Charlotter Kolters vann silvur, meðan Ann Banke gjørdist nummar 11. Og saman við sjeynda plássinum hjá Joan rakk hetta til HM-gull. Eitt úrslit, sum Joan sjálvsagt fegnast um.

- Eg eri sera fegin um hetta sjeynd plássi, tí hetta var eitt sterkt felt við nógvum góðum kvinnum. Eg hevði sett mær sum mál at koma inn í top 10, og tað náddi eg, og eri eg sjálvandi sera fegin. At vit so eisini vinna gull í liðkappingini er fantastiskt. Vit arbeiddu hart fyri tí í dag, og tað er jú altíð stuttligt, tá alt tað harða arbeiði, sum ikki bara er í dag, men eisini venjingin og fyrireikingarnar, løna seg, sigur Joan í tíðindaskrivi til føroysku miðlarnar.



*So eiga Føroyar eisini ein heimsmeistara. Saman við donsku liðfeløgunum svam, súkklaði og rann Joan Bláfoss seg til gull, tá hon í gjár legði í alt 154 kilometrar aftur um bak*

# Lyklauppgerðir bíða fyri framman

**TB venjarin ásannar, at hansara lið ikki longur er partur av kappingini um at flyta upp í bestu deildina**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð í ár er hvørki VB/Sumba ella TB annað av liðunum omanfyri strikuna, sum í síðsta enda fer at gera av, hvørji liðini verða, sum næsta kappingarár skulu spæla í bestu deildini.

TB legði bragdliga fyri í vár, og VB/Sumba hevur leingi verið annað av oddaliðunum. VB/Sumba megnaði ikki meiri enn málleysan javnleik í Gundadali leygardagin, og tað ber við sær, at nú eru tað AB og 07 Vestur, sum bæði vunnu hesa ferð, sum eru á tveimum teimum fremstu plássunum.

TB tapti 1-0 á Argjum. TB venjarin, Jón Johannesen, segði undan vikuskiftinum í samrøðu við Suðurrás, at hetta var síðsti møguleikin hjá hansara liði. Um TB ikki vann á Argjum, so varð eingin vón fyri uppflyting í ár. Við at hyggja at støðutalvuni er skjótt at verða samdur við TB venjaranum í hesum.

AB er fremsti favoritturin, tí argjamenn eru einsamallir á toppinum. Men tað er framvegis møguleiki fyri, at tað skjótt skal snara annan veg. Komandi vikuskifti er eingin dystur í Formuladeildini, tí landsliðið fer at spæla á útivølli. Men tað verður fult umfar í næstbestu deildini.

Tá verður lyklauppgerðin í Sørvági, har AB fer at vitja. Fyrr í ár vann 07 Vestur 4-3 á heimavølli ímóti AB. Tað eru eisini aðrar uppgerðir, sum mugu roknast at vera lyklauppgerðir. Eitt nú skal 07 Vestur spæla á Sevmýri annan leygardag, 20. september fer AB at vitja á Vágseiði, og 27. september fer 07 Vestur at vitja í Vági.

## FAKTA um 1. deild

**20. umfar**
**AB-TB 1-0 (1-0)**
1-0: Allan Michelsen 32.
Reytt kort: Tórur Mortensen, TB

**B68-07 Vestur 1-4 (0-2)**
0-1: Tór-Ingar Akselsen 26.
0-2: Jóan Petur á Stongum 38.
0-3: Jens Erik Rasmussen br 60.
0-4: Jovan Panic 72.
1-4: Óli Olsen 87.

**EB/Streymur-NSÍ 1-3 (1-2)**
0-1: Klæmint A. Olsen 4.
0-2: Kári Hansen br 17.
1-2: Andru Poulsen 27.
1-3: Eddie Mikkelsen 90.
Reytt kort: Niels Pauli Danielsen, EB/Streymur

**HB-VB/Sumba 0-0**

**KÍ-Víkingur 1-2 (0-1)**
0-1: Bárður Hansen 13.
1-1: David Bertholdsen 54.
1-2: Sverri Jacobsen br 87.
Reytt kort: Asbjørn Tungá, KÍ, og Bjarki Vágstún, KÍ

**21. umfar**
**7. september**
07 Vestur-AB
NSÍ-HB
VB/Sumba-KÍ
Víkingur-B68
8. september
TB-EB/Streymur